Tilmæli um at menna

# vitanarstøðið á harðskapsøkinum



**Tilmæli um at menna vitanarstøðið á harðskapsøkinum**
© Søgu- og samfelagsdeildin 2023
Útgevari: Søgu- og samfelagsdeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Sniðgeving og uppseting: Anna og Annað – Anna Simonsen
Frágreiðingin er fíggjað av Almanna- og mentamálaráðnum.

**Arbeiðsbólkur:**
Elisabeth Skarðhamar Olsen, ph d,-lesandi, Lancaster University
Erika Anne Hayfield, lektari, Fróðskaparsetur Føroya
Firouz Gaini, professari, Fróðskaparsetur Føroya
Jónleyg Djurhuus, ph d -lesandi, Aarhus Universitet
Katrin Dalsgaard Nolsøe, vísindaligt hjálparfólk, Fróðskaparsetur Føroya

**Fylgibólkur:**
Anna Katrin Matras, fulltrúi, Almanna- og mentamálaráðið
Eyðvør Tausen Olsen, leiðari, Kvinnuhúsið

**Bústaður:**
Jónas Broncks gøta 25
FO-100 Tórshavn
Tel.: +298 352580
Teldupostur: ssd@setur.fo

# Innihaldsyvirlit

**Formæli** . . . . . 5

**Samandráttur** . . . . . 6

**Inngangur** . . . . . 7
Um frágreiðingina . . . . . 7
Hvat er harðskapur í parløgum og nærsambondum? . . . . . 7
Hvat er harðskapsøkið? . . . . . 8

**Háttalag og empiriskt tilfar** . . . . . 9
Hvussu er tilfarið savnað saman? . . . . . 9
Samrøður við aktørar, ið virka á harðskapsøkinum . . . . . 9
Sjónarmið teirra, ið hava verið fyri harðskapi . . . . . 11

**Yvirlit yvir tilmæli** . . . . . 12

**A. Vitanarmenning á harðskapsøkinum** . . . . . 13
1. Skipað samstarv, ið skal menna granskingargrundaða vitan . . . 13

**B. Verandi vitan og tilfar á harðskapsøkinum** . . . . . 16
2. Eyðmerking og skráseting av tilfari á harðskapsøkinum . . . . . 16
3. Skipan av tilfari eftir vísindaligum leisti . . . . . 18

**C. Upplivingar hjá harðskapsraktum** . . . . . 19
4. Kanning av harðskapsupplivingum í Føroyum . . . . . 19
5. Kanning av tøgnini, sum valdar á harðskapsøkinum . . . . . 19
6. Kanning av harðskapsfatanum í Føroyum . . . . . 22

**D. Viðkvæmir samfelagsbólkar og harðskapsøkið** . . 23
7. Kanning av støðuni hjá minnilutum á harðskapsøkinum. . . . . 23

**Fylgiskjal 1: Aktørar á harðskapsøkinum** . . . . . 24

# Formæli

Í Føroyum hava vit havt skipað arbeiði á harðskapsøkinum í meira enn 30 ár. Talan var tá, eins og aðrastaðni, um, at kvinnur tóku stig til at seta á stovn Kvinnuhús at arbeiða móti harðskapi ímóti kvinnum. Kvinnuhúsið hevði gjørt eitt megnar arbeiði, men tørvur var eisini á einari miðvísari ætlan frá almennari síðu. Í 2012 var tí *Heildarætlan: Harðskapur í parløgum og nærsambondum* løgd fram, og vórðu átøkini síðani víðkað í 2016 til eisini at fevna um kynsligan ágang. Hesi árini eru nógv góð átøk sett í verk, og arbeitt hevur verið miðvíst fyri at økja um vitanina um harðskap í føroyska samfelagnum. Heildarætlanin hevur seinni verið eftirmett í Almannamálaráðnum.

Ein spurnakanning varð eisini gjørd í 2020, sum gav innlit í nøkur viðurskifti um harðskap í Føroyum, og í hvønn mun føroyingar eru varugir við átøkini, sum hava verið sett í verk á harðskapsøkinum. Kanningin vísti, at støðan við harðskapi er ikki góð í Føroyum. Eisini vísti kanningin, at tilvitskan í Føroyum um átøkini, sum hava verið gjørd, er sera høg. Við støði í spurnakanningini og eftirmetingini kundi samstundis eisini staðfestast, at tørvurin er stórur at fáa til vega meira vitan innan økið, og at nógv arbeiði liggur fyri framman á harðskapsøkinum sum heild.

Í sambandi við, at nýggj harðskapsverkætlan skuldi gerast fyri tíðarskeiðið 2023-2028, varð avgjørt, at kortleggja, hvør vitan er, og hvør vitan vantar á harðskapsøkinum. Kanningararbeiðið, sum tilmælini í hesari frágreiðing byggja á, hevur bæði verið brúkt til at fáa yvirlit yvir, hvør vitan vantar á harðskapsøkinum í Føroyum, og sum grundarlag undir yvirskipaðu harðskapsverkætlanina.

Hendan frágreiðingin skal tí lesast sum verandi ein partur av yvirskipaðu heildarætlanini, men har vit her seta sjóneykuna á tilmæli at menna vitanarstøðið á harðskapsøkinum. Frágreiðingin byggir á eitt umfatandi arbeiði, sum hevur verið gjørt í 2022-23 at lýsa harðskapsøkið og vitanartørvin um harðskap. Endamálið við kanningararbeiðinum var at kortleggja og tosa við myndugleikar, almennar og privatar stovnar, felagsskapir og áhugapartar á harðskapsøkinum og eyðsæð eisini tey harðskapsraktu. Vit hava spurt øll um teirra hugsanir um, hvussu økið eigur at mennast, hvørjar kanningar eru neyðugar at gera, og hvør vitan vantar um harðskap í Føroyum.

Í tilgongdini at kortleggja vitanina á harðskapsøkinum í Føroyum hava vit tosað við nógv fólk, sum antin arbeiða beinleiðis við harðskapi, á markamótinum til harðskap ella sum sjálvi hava verið fyri harðskapi. Takk til tykkum, sum hava givið okkum av tykkara tíð, tykkara vitan og tykkara upplivingum. Uttan tað íkastið hevði ikki verið gjørligt at skriva hesi tilmæli.

Arbeiðsbólkurin

# Samandráttur

Henda frágreiðing viðger vitanartørvin á harðskapsøkinum í Føroyum og leggur við støði í hesum fram tilmæli um, hvussu vitanarstøðið á økinum kann mennast. Frágreiðingin vísir á, at vísindalig átøk á harðskapsøkinum mugu raðfestast, skulu vit í Føroyum kunna røkka vitanarstøðið, sum grannalond okkara hava um harðskap í parløgum og nærsambondum.

Sum heild er vitanartørvurin á harðskapsøkinum í Føroyum sera stórur. Hetta er ein avbjóðing fyri miðvísa politiska arbeiðið á økinum, tí hetta ger tað torført at meta um tørvin og gongdina á økinum. Tilmælini, sum verða løgd fram í hesi frágreiðing, eru tískil ætlað at menna vitan, sum kann styðja undir og styrkja um átøkini, sum verða gjørd á økinum.

Grundað á eina kanning av vitanartørvinum á harðskapsøkinum leggur frágreiðingin tilmæli fram, um hvussu farast skal undir at menna vitanarstøðið á harðskapsøkinum, og hvørji evni kunnu metast at vera serliga átrokandi at granska í føroyska samanhanginum.

**Fyrsta yvirskipaða tilmælið** er at miðsavna og skipa vitanarmenning á økinum. Hetta skal gerast við at seta á stovn eitt skipað samstarv, sum skal standa á odda fyri at seta í verk tær vísindaligu verkætlanirnar, sum skulu gerast á økinum.

**Næsta yvirskipaða tilmælið** er at eyðmerkja, skráseta og skipa verandi vitan á harðskapsøkinum. Hetta skal tryggja, at verandi vitan á økinum kann brúkast í vísindaligum høpi í framtíðini.

**Triðja yvirskipaða tilmælið** er at kanna harðskapsupplivingar í Føroyum. Hetta skal skal vísa á, hvørji viðurskifti og hvørjar avbjóðingar harðskapsraktir persónar mugu navigera í føroyska smásamfelags samanhanginum.

**Fjórða yvirskipaða tilmælið** er at eyðmerkja, hvørjir samfelagsbólkar eru serliga útsettir fyri harðskapi og hava serligar avbjóðingar, tá tað kemur til at leita sær ráðgeving og hjálp í føroyska samfelagnum. Hetta skal tryggja, at øll – óansæð kyn, trúgv, húðarlit, tjóðskap, seksuella sannføring, málførleikar og so framvegis – verða loftaði, um tey eru fyri harðskapi.



# Inngangur

## Um frágreiðingina

Frágreiðingin leggur fram tilmæli um, hvussu vitanarstøðið á harðskapsøkinum í Føroyum kann mennast. Hetta verður gjørt við støði í eini kvalitativari kanning av vitanartørvinum á harðskapsøkinum í Føroyum, har dentur serliga er lagdur á at kortleggja viðkomandi aktørar og vantandi vitan á økinum.

Frágreiðingin er knýtt at miðvísa politiska arbeiðinum á harðskapsøkinum, sum hevur verið ígongd síðan 2010, tá avgerð varð tikin um at gera ta fyrstu heildarætlanina fyri harðskap í parløgum og nærsambondum[1]. Í sambandi við, at tað í løtuni verður arbeitt við eini nýggjari heildarætlan fyri harðskapsøkið, skal frágreiðingin leggja fram tilmæli um vitanarmenning og granskingarátøk á økinum. Hetta skal tryggja, at granskingargrundað vitan um harðskap í parløgum og nærsambondum verður støðugt ment og raðfest í Føroyum.

Frágreiðingin er skipað sum ein raðfesting av, hvørji vísindalig átøk verða mett at vera mest átrokandi og týdningarmikil at seta í verk.

## Hvat er harðskapur í parløgum og nærsambondum?

Frágreiðingin viðger harðskap í parløgum og nærsambondum. Tað vil siga, at tá skrivað verður um harðskap, so skal hetta skiljast sum harðskap í parløgum og nærsambondum. Parlag skal í hesum sambandi skiljast sum pør, sum eru gift ella ikki og sambúgvandi ella ikki, eins og talan eisini kann vera um fyrrverandi parløg. Nærsambond skulu somuleiðis skiljast sum persónar, sum ein hevur tætt tilknýti til. Í flestu førum merkir hetta, at talan er um familjur og børn, men hetta kann tó eisini fevna um onnur sambond, har fólk eru tætt tengd at hvørjum øðrum.

Heildarætlanin frá 2011 allýsir harðskap í parløgum og nærsambondum sum *„ein gerð ella hóttan, sum kann gera seg inn á sjálvræðisrættin hjá einum persóni ella sum elvir til pínu, skaða ella ger viðkomandi bangnan – sama um tað eru børn ella vaksin. Harðskapurin kann hava somu ávirkan á tey, sum eru vitni til harðskapin. Harðskapurin kann vera tilætlaður ella framdur í sinnisrørslu og fer út um samfelagsmørk, reglur og lógir (...) Aloftast er talan um eitt mynstur av valdsatburði, heldur enn einstakar hendingar. Tað merkir, at harðskapur í parlagi og nærsambondum kann vera ein samanseting av ymiskum atburði“. (s. 7)*

Sum allýsingin frá heildarætlanini vísir á, so kann harðskapur síggja ymiskur út, og ofta er talan um eina samanseting av fleiri sløgum av harðskapi. Umframt annað, kann talan í tílíkum førum vera um likamligan, sálarligan, kynsligan, fíggjarligan, materiellan og talgildan harðskap.

1 Fyrsta heildarætlanin um harðskap í parløgum og nærsambondum varð løgd fram í mars 2011, og í mars 2015 var ein heildarætlan um kynsligan ágang gjørd. Harumframt eru fleiri onnur átøk á økinum, síðani fyrstu heildarætlanina.

**Mynd 1: Harðskapsøkið**




## Hvat er harðskapsøkið?

Harðskapsøkið verður í frágreiðingini lýst sum allan tann samanhangin, sum harðskapsrakt og harðskapsfremjarar navigera harðskapsupplivingina í. Við atliti at geva eina nágreiniligari mynd av, hvat hetta merkir, vísir myndin omanfyri, hvussu hetta skal skiljast. Myndin er gjørd við íblástri frá sosialøkologiskum ástøði[2] og vísir á týdningin av at hyggja eftir heildini, sum tann harðskapsrakti og harðskapsfremjarin eru partar av. Myndin lýsir ymisk løg á harðskapsøkinum, sum øll ávirka og umskara hvørt annað[3].

Myndin skal skiljast sum, at viðurskifti í hesum fýra løgum eru í einum samansettum samanspæli, har bæði forðandi og drívandi kreftir viðvíkjandi harðskapi gera um seg og interagera við hvørt annað[4].

Harðskapsøkið er sostatt breitt og fevnir um ymisk løg, sum á ymiskan hátt verða lýst í frágreiðingini. Harðskapsupplivingin stendur her sentralt, men er tó eisini tengd at einum samanhangi, sum inniber lokal- og nærumhvørvið, har talan kann vera um familju, vinfólk, stovnar, myndugleikar, fakpersónar og skipanir, eins og samanhangurin eisini er ávirkaður av ráðandi normum, virðum og fatanum í samfelagnum.

2 Upprunamyndin lýsir fyribyrgjandi arbeiði móti harðskapi í parløgum og nærsambondum, ímeðan myndin í frágreiðingini er tillagað at lýsa, hvat harðskapsøkið fevnir um.

3 Oldrup, H. (2020). *Vold i familien – viden for fagfolk*. Akademisk Forlag.

4 Oldrup, H. (2020). *Vold i familien – viden for fagfolk*. Akademisk Forlag.



# Háttalag og empiriskt tilfar

Hetta brotið snýr seg um, hvussu tilfarið, sum er grundarlagið undir frágreiðingini, er innsavnað. Empiriska tilfarið er sett saman av kvalitativum samrøðum, sum eru gjørdar við persónar, ið hava verið fyri harðskapi, og við starvsfólk frá ymiskum stovnum og myndugleikum, ið virka á harðskapsøkinum.

## Hvussu er tilfarið savnað saman?

Empiriska tilfarið er savnað við íblástri frá háttaløgum innan kritiska etnografi og luttakandi aktiónsgransking. Serstakt við hesum báðum háttaløgum er gjøgnumskygni og játtan um, at framda kanningararbeiðið er motiverað av einum ynski um inklusión og rættvísi í samfelagnum og miðvíst virkar fyri at basa ymisk sløg av órætti og ójavna í samfelagnum[5]. Háttaløgini hava harumframt tað í felag, at samstundis sum lýst verður, *hvat er*, so verður stórur dentur eisini lagdur á at viðgera, *hvat kundi ella átti at verðið*[6].

Haraftrat hava háttaløgini tað í felag, at dentur verður lagdur á at umboða útsettar bólkar, sum ikki hava eina rødd í samfelagnum til at gera vart við tann órætt, sum teir eru fyri[7]. Sjónarmið teirra, ið hava verið fyri harðskapi viga sostatt nógv í hesi frágreiðing, og er tað eisini av somu orsøk, at Kvinnuhúsið hevur havt ein týðandi leiklut í allari tilgongdini. Leiðarin á Kvinnuhúsinum hevur verið við í fylgibólkinum, sum hevur staðið fyri arbeiðinum, umframt at fleiri samrøður hava verið gjørdar við starvsfólk á stovninum.

Tilgongdin til at gera samrøður hevur íblástur frá hesum báðum háttaløgum, eitt nú við at eggja til hugleiðingar um, *hvat kundi verið gjørt frameftir* á harðskapsøkinum sum heild og á einstøku virkisøkjunum.

## Samrøður við aktørar, ið virka á harðskapsøkinum

Samrøður eru gjørdar við starvsfólk á 23 stovnum og myndugleikum, ið antin hava eitt beinleiðis ella óbeinleiðis markamót til harðskapsøkið. Hesir stovnar og myndugleikar verða í frágreiðingini nevndir aktørar á harðskapsøkinum.

Talan er bæði um aktørar, so sum Kvinnuhúsið, sum arbeiða beinleiðis við harðskapi á virkisøki teirra, eins og talan er um aðrar aktørar, ið virka á einum markamóti á harðskapsøkinum. Hesi eru t.d. aktørar í heilsuverkinum, sum hava eina aðra høvuðsuppgávu at røkja, men sum kunnu hugsast at møta harðskapi í virkisøkið teirra.

Samrøðurnar við aktørar vórðu hildnar í tíðarskeiðinum 1. november 2022 til 24. mars 2023. Samrøðurnar hava verið skipaðar soleiðis, at fyrst varð ein innleiðandi samrøða hildin, har tosað varð um politiska arbeiðið á harðskapsøkinum í Føroyum, og um hvussu gjørt verður í grannalondum okkara. Seinni var ein onnur samrøða hildin, har tosað var um virkisøkið hjá viðkomandi stovni ella myndugleika. Hetta fevndi millum annað um, á hvønn hátt harðskapur sæst innan virkisøkið hjá viðkomandi aktøri, hvussu farið verður fram í tílíkum førum, og hvussu viðkomandi stovnur metir, at harðskapsøkið kann mennast framyvir.

5 Kincheloe, J. L., & McLaren, P. L. (1994). Rethinking critical theory and qualitative research. Denzin, N. K. & Lincoln, Y. S. (ritstj.). *Handbook of qualitative research.* Sage Publications. 138–157.

6 Madison. D. (2005). Introduction to critical ethnography: Theory and methods. *Critical ethnography: Method, ethics & performance.* Sage publications. 1-16.

7 Kindon, S. & Pain, R. & Kesby, M. (2007). *Participatory action research approaches and methods: Connecting people, participation and place.* Routledge. 9., Aldridge, J, 2015. *Participatory research: Working with vulnerable groups in research and practice.* Politiy Press.

### Samrøður sum rúma endurskoðan

Samrøðurnar við stovnar og myndugleikar vórðu skipaðar eftir einum samrøðusniði, sum miðaði eftir at rúma og stimbra til sjálvrefleksión og sjálvkritikki.[8] Fyrst blivu aktørarnir spurdir um teirra royndir við harðskapi í sínum virkisøki. Síðan vórðu teir bjóðaðir at reflektera um og endurskoða verandi mannagongdir og framferðarhættir.

Tilgongdin byggir á eina viðurkenning av, at menniskju hava samansett sjónarmið, sum áhaldandi eru í broyting, og at hesi eisini ofta broytast við at seta orð á tað praksis, sum ofta er ósøgd ella tikin fyri givið. Rúmið fyri endurskoðanum verður í hesum sambandi hildið at vera ein týðandi partur í at eggja aktørar til at verða ein virkin og virdur partur í eini broytingartilgongd[9]. Tað, at sjónarmið og fatanir allatíð eru í broyting, vóru tað eisini fleiri dømir um í samrøðunum.

### Broyting í sjónarmiðum hjá aktørum

Undir innsavningararbeiðinum vísti tað seg, at fleiri stovnar ikki reiðiliga vóru á greiðum máli um, hví teir vórðu spurdir um at luttaka í eini kanning av harðskapsøkinum. Fleiri teirra løgdu út við at staðfesta, at teir ongan harðskap uppliva á virkisøkið teirra. Í flestu førum broyttist hetta sjónarmiðið sum samrøðan fráleið.

Tað, at tíð bleiv sett av, til at skilgreina og tosa fokuserað um, hvat harðskapur er, og hvussu breitt harðskapsmál kunnu fevna, hevði við sær, at teir flestu aktørarnir at enda dugdu at síggja, at teir hava royndir við harðskapsmálum á virkisøkið teirra, og at teir í ymiskan mun virka á einum harðskapsmarkamóti. Seinni í frágreiðingini verður greitt nærri frá, hvat serligt íkast hetta háttalagið hevur givið.

8 Way, A. K., Kanak Zwier, R., & Tracy, S. J. (2015). Dialogic interviewing and flickers of transformation: An examination and delineation of interactional strategies that promote participant self-reflexivity. *Qualitative Inquiry,* 21(8), 720–731.

9 Ibid.







### Sjónarmið teirra, ið hava verið fyri harðskapi

Tilfarið, sum umboðar sjónarmið hjá harðskapsraktum, varð savnað saman á ein øðrvísi hátt enn tilfarið, sum fevnir um aktørar á harðskapsøkinum. Hetta kemst av, at tað var truplari at fáa atgongd til hetta tilfarið. Tilfarið er í høvuðsheitum frá samskifti (umvegis telefon, teldupost og andlit til andlit) við tríggjar kvinnur, ið hava verið fyri harðskapi. Haraftrat hevur nógv samskifti verið við Kvinnuhúsið, sum eisini hevur umboðað sjónarmið teirra, ið eru harðskapsrakt.

Í samrøðunum hevur verið miðað eftir at fáa innlit í persónligu søguna við harðskapi. Dentur hevur í hesum sambandi verið lagdur á at skilja betur, hvat tey, ið hava upplivað harðskap, meta kundi verið gjørt betur og øðrvísi á økinum.

### Umboðan av harðskapsupplivingum

Endamálið við tilfarinum er í høvuðsheitum at umboða rødd og sjónarmið teirra, ið eru ella hava verið fyri harðskapi. Sum lýst í brotinum um harðskapsøkið, so eru tað harðskapsupplivingar, ið binda økið saman. Tað eru tey, ið eru ella hava verið fyri harðskapi, sum eru høvuðsorsøkin til, at harðskapsøkið yvirhøvur er eitt viðkomandi evni at leggja dent á. Tískil eigur rødd teirra at vera ein grundleggjandi liður í at menna vitanina á økinum[11].

Seinni í frágreiðingini verður hetta tikið upp aftur, har víst verður á, at neyðugt er við eini fjølbroyttari umboðan av harðskapsupplivingum. Munur er á, hvørjum harðskapi fólk eru fyri, eins og hvørjir møguleikar og førleikar viðkomandi persónar hava fyri at leita sær hjálp og stuðul. Við støði í vavinum av frágreiðingini verður varpað ljós á týdningin av at fáa lýst fjølbroytni í, hvørjar møguleikar harðskapsrakt í Føroyum hava.

### Dulnevni og etisk fyrilit

Harðskapur í parløgum og nærsambondum er eitt viðkvæmt evni, og tískil er neyðugt at taka serlig etisk fyrilit, tá arbeitt verður við evninum. Í hesum sambandi er serliga umráðandi, at kvinnurnar, ið hava luttikið í kanningini, eru dulnevndar . Í einum lítlum samfelag krevur hetta, at eyka atlit verða tikin, og tí er tað ikki nøktandi, einans at dulnevna viðkomandi[12]. Nærri upplýsingar verða tískil ikki givnar um, hvussu samband er fingið við kvinnurnar, sum hava luttikið í kanningini, eins og søgur teirra eru broyttar og fragmenteraðar í frágreiðingini.

10 Aldridge, J, (2015). *Participatory research: Working with vulnerable groups in research and practice.* Polity Press.
11 Hayfield, E. A. (2022). Ethics in small island research: Reflexively navigating multiple relations. *Shima,* 16(2), 233–249.

# Yvirlit yvir tilmæli

| A. Vitanarmenning á harðskapsøkinum |
|---|
| 1. Skipað samstarv, ið skal menna granskingargrundaða vitan |
| B. Verandi vitan og tilfar á harðskapsøkinum |
| 2. Eyðmerking og skráseting av tilfari á harðskapsøkinum |
| 3. Skipan av verandi tilfari eftir einum vísindaligum leisti |
| C. Upplivingar hjá harðskapsraktum |
| 4. Kanning av harðskapsupplivingum í Føroyum |
| 5. Kanning av tøgnini, sum valdar á harðskapsøkinum |
| 6. Kanning av harðskapsfatanum í Føroyum |
| D. Viðkvæmir samfelagsbólkar og harðskapsøkið |
| 7. Kanning av støðuni hjá minnilutum á harðskapsøkinum |





# A. Vitanarmenning á harðskapsøkinum

Fyrsta yvirskipaða tilmæli er at arbeiða málrættað at menna vitanarstøðið á harðskapsøkinum í Føroyum.

Arbeiðið á harðskapsøkinum hevur ment seg nógv úti í heimi seinastu áratíggjuni, nakað, sum millum annað sæst aftur í orkuni, sum verður løgd í at menna vísindaligt arbeiði á økinum. Hetta hevur ført til, at fleiri av grannalondum okkara hava sett á stovn vitanardeplar, ið savna inn og menna granskingargrundaða vitan um økið. Hesir stovnar eru skipaðir eftir ymiskum leistum, men hava tó í felag, at fokus er á granskingargrundaða vitanarmenning, sum síðani gevur avkast aftur til samfelagið.

Henda menningin er enn ikki farin fram á føroyska harðskapsøkinum. Eingin skipað eind hevur ábyrgdina av at menna granskingargrundaða vitan á økinum, og sum heild eru hagtøl og annað tilfar um økið – vísindaligt og ikki – sera avmarkað.

Tískil er neyðugt, at vísindalig átøk verða raðfest. Ein raðfesting av vitanarmenning á økinum skal stuðla undir, at miðvísu politisku átøkini verða kjølfest í granskingargrundaðari vitan um støðuna og tørvinum á økinum.

## 1. Skipað samstarv, ið skal menna granskingargrundaða vitan

**Mælt verður til,** at vísindaliga arbeiðið á harðskapsøkinum verður miðsavnað undir einum skipaðum samstarvi, ið hevur til endamáls at menna granskingargrundaða vitan um harðskapsøkið í Føroyum. Umframt granskingarførleikar, verður eisini mælt til, at Kvinnuhúsið, ið bæði arbeiðir við harðskapsfakligari vitan og umboðar harðskapsrakt, fær ein týðandi leiklut í hesum samstarvi. Hetta skal tryggja, at harðskapsrakt fáa ein leiklut í avgerðum um, hvør vitan verður ment á økinum, samstundis sum at gransking, praksis og handling við hesum leisti verða samantvinnað[12].

**Endamálið við hesum er** at miðsavna serkunnleika á harðskapsøkinum, eins og at tryggja, at tað miðvíst verður arbeitt við at menna vitanarstøðið á økinum. Ein liður í hesum arbeiði verður at samskipa, raðfesta og veita ráðgeving til tær vísindaligu verkætlanirnar, sum framyvir skulu gerast á økinum.

Væntandi kann ein tílík miðsavnan av serkunnleika, gransking og vitanarmenning við tíðini skapa nakrar ringar í vatnið. Millum annað kann hugsast, at ein tílík vitanarmenning røkkur út til útbúgvingarøkið og gerst partur av útbúgvingartilfarinum hjá eitt nú lærarum, sjúkrarøktarfrøðingum, námsfrøðingum, námsfrøðihjálparum, heilsuhjálparum og heilsurøktarum. Eisini er ynskiligt, at farið verður undir at menna skeið, sum veita harðskapsfakliga førleikamenning til fakbólkar sum hesar, hvørs virksemi hevur eitt markamót til harðskapsøkið.

12 Kindon, S. & Pain, R. & Kesby, M. (2007). *Participatory action research approaches and methods: Connecting people, participation and place.* Routledge.

**Samrøðurnar við aktørar, ið virka í einum markamóti til harðskapsøkið vísa,** at tørvur er á, at fleiri starvsfólk verða eggjaði til at nema sær harðskapsfakliga vitan og førleikar, soleiðis at tey kenna seg betur før fyri at lofta teimum persónum, ið eru raktir av harðskapi. Harumframt er ynskiligt, at hava eina ráðgeving, sum starvsfólk kunnu venda sær til um ivamál, ið kunnu stinga seg upp í sambandi við (illgruna um) harðskapsmál.

## Innlit frá kanningararbeiðinum

Harðskapsfaklig vitan inniber eitt nú vitan um, hvat harðskapur er, og hvørji harðskapseyðkenni eru. Hetta merkir eisini, at hava innlit í, hvussu harðskapsrakt kunnu hava lyndið at bera seg at, tá spurt verður inn til harðskap. Hetta kann til dømis vera, at harðskapsrakt ofta látast til ikki at síggja harðskapin at byrja við og royna at fjala útyvir hann. Í slíkum støðum tørva aktørarnir okkurt at fyrihalda seg til, so sum vitan um, hvar tey kunnu venda sær, ella hvønn tey kunnu vísa harðskapsraktum víðari til. Hetta kann gera, at hjálpin ikki verður persónstengd, og at starvsfólk á harðskapsmarkamótinum *tora* at tosa um og spyrja inn til harðskap.

Vandin við vantandi vitan og mannagongdum er, at illgruni um harðskap ikki verður tikin upp. Sum eitt starvsfólk á einum stovni greiddi frá í samrøðu, hevði hon ynskt, at hon hevði betur førleikar og møguleikar fyri at veita hjálp til harðskapsrakt, men hon hevur eina kenslu av, at hon *„einki kann gera“*, um hon hevur ein illgruna. Hon kennir seg ikki føra fyri at handfara støðuna, og veit ikki, hvar hon kann venda sær fyri at fáa vegleiðing. Sostatt varpaði hon ljós á, hvussu tyngjandi tað kann kennast at gerast varug við trupulleikan og viðkomandi varnarteknum, tá hon síðan ikki følir, at hon kann gera nakað.

Flestu stovnar og myndugleikar vísa somuleiðis áhuga fyri at víðka vitan teirra um, hvussu støður við harðskapi handfarast skynsamt, og vildu ynskt, at kunning um verandi tilboð, vitan og tilfar var at finna. Tora aktørar á harðskapsmarkamótinum betur at taka illgrunan um harðskap upp, kann hetta stuðla undir, at harðskapurin verður eyðmerktur fyrr í sokallaðu harðskapsringrásini[13]. Hetta kann fyribyrgja, at harðskapsrakti persónurin verður *„vavdur longri inn í fremjarans spinn“*, sum ein harðskapsrakt kvinna orðaði tað.

Tað framgongur í samrøðunum við harðskapsraktar kvinnur, at tað ofta er trupult at viðurkenna, at ein er fyri harðskapi, og hetta gerst torførari longri tíð gongur. Millum annað tí harðskapurin økist so líðandi.

Tilgongdin at koma úr harðskapi er aloftast ein sera drúgv, samansett og tung tilgongd, sum krevur dyggan stuðul frá teimum, ið eru rundan um tann harðskapsrakta og vitan um, hvussu harðskapur kann síggja út.

Hetta sæst í søguni hjá eini kvinnu, sum greiðir frá, at hennara *„byrjan til eitt betri lív var, tá grannakonan tordi at siga, at hon visti, at eg ikki hevði tað lætt, og at hon var har, um eg hevði brúk fyri henni.“* Kvinnan greiðir soleiðis frá upplivingini:

> ” Grannakonan, sum gekk nógv inn til mín, reisti seg bara og gjørdi seg til at fara. Eg fylgdi henni út í durin, lat hurðina aftur og so prátaðu vit leingi har úti um leyst og fast. Á veg út gjøgnum úthurðina vendi hon sær á, gav mær eitt klemm og segði: ‘Eg veit, at tú ikki hevur tað lætt. Eg eri her, um tú hevur brúk fyri mær.’ Eg fór at gráta. Hetta var so forloysandi hjá mær, tí onkur annar eisini sá tað. Tað var ikki longur nakað, sum eg bara bilti mær inn. Við afturlatnari hurð í durinum og klemmi frá grannakonuni segði eg fyri fyrstu ferð, hvussu hart tað var at liva saman við honum. Hetta gjørdist vendipunkið hjá mær. Hetta gjørdi, at eg fekk eina vón. Hóast eg ikki var feilfrí, so hevði eg ikki alla skuldina. Onnur sóu tað eisini. “

Dømi vísir, hvussu tað at koma úr harðskapi í parlagi ikki einans snýr seg um at sannkenna harðskapin fyri sær sjálvari. Nærumhvørvið og fólk uttanfyri hava aloftast ein eins týðandi leiklut. Tey kunnu millum annað hjálpa tí harðskapsrakta at viðurkenna og seta orð á, hvat tað er, sum tann harðskapsrakti er fyri. Tann harðskapsrakti hevur ofta, um harðskapurin kemur nóg langt, *„mist seg sjálvan spakuliga vekk“*, sum ein kvinna orðar tað.

Sostatt eru tað ofta onnur, ið síggja støðuna úr frástøðu, ið kunnu fáa eyga á týðandi vandatekin í parlagnum. Hetta kunnu vera fólk í nærumhvørvinum hjá persóninum, eins og tað kunnu vera aktørarnir, sum tann harðskapsrakti kemur í samband við.

Hóast grannakonan var ein sera týðandi partur av søguni hjá kvinnuni, so var tíðin eftir hetta, og hvussu kvinnan varð møtt av øðrum á leið síni úr harðskapinum eins umráðandi fyri útfallið av støðuni hjá kvinnuni. Vegurin úr harðskapinum er ikki ein einføld tilgongd og krevur aloftast dyggan stuðul og hjálp frá ymiskum fólkum og skipanum.

13 Lundgren, E. (2001). *Våldets normaliseringsprocess: två parter-två strategier.* ROKS.

# B. Verandi vitan og tilfar á harðskapsøkinum

Næsta yvirskipaða tilmælið er at eyðmerkja, skráseta, skipa og miðsavna verandi vitan og tilfar á harðskapsøkinum. Fyri at menna vitanarstøðið á økinum, er ein umráðandi partur av hesum at eyðmerkja, hvør verandi vitan á økinum er, hvar hon er staðsett, og hvussu hon kann skipast eftir einum vísindaligum leisti.

## 2. Eyðmerking og skráseting av tilfari á harðskapsøkinum

**Mælt verður til,** at ein kortlegging verður gjørd av aktørum á harðskapsøkinum. Hetta skal vísa á hvørjir aktørar hava viðkomandi vitan um hendi og skulu eggjast til at skráseta mál, har harðskapur framgongur á virkisøki teirra.

**Endamálið við hesum er** at fáa til vega hagtøl og tilfar, sum kann lýsa støðuna á harðskapsøkinum í Føroyum. Hetta kann geva innlit í, á hvønn hátt harðskapur framgongur á ymiskum arbeiðsøkjum, títtleikanum av hesum, og hvønn harðskapsrakt ofta koma í samband við, tá illgruni um harðskap stingur seg upp, ella tá funnið verður fram til harðskapin. Væntast kann harumframt, at skráseting av harðskapi kann føra til, at harðskapur gerst eitt meir sjónligt evni á virkisøkinum hjá fleiri aktørum.

**Samrøðurnar við aktørar á økinum vísa,** at teir flestu aktørarnir ikki skráseta mál við harðskapi sum harðskapsmál, serliga av teirri orsøk, at hetta ikki er eitt evni, sum flestu aktørarnir hava stórvegis fokus á, tí teir hava eina aðra høvuðsuppgávu at taka sær av. Hetta ger, at harðskapur í fleiri førum gerst eitt slag av „ikki-tema".

Hóast hetta, bleiv greitt undir samrøðunum, at teir flestu aktørarnir virka á einum markamóti til harðskapsøkið. Hetta vísir sostatt eisini á týdningin, sum ein kvalitativ tilgongd hevur fyri gransking á harðskapsøkinum.

### Innlit frá kanningararbeiðinum

Tað gjørdist tíðliga í kanningararbeiðinum greitt, at harðskapsøkið ikki er ein samlað og grundfest eind. Fleiri, sum í ymiskan mun virka á økinum, vildu enntá í fyrstu atløgu ikki sagt, at harðskapur er partur av teirra virkisøkið. Ein týðandi partur av innsavningararbeiðinum var tískil, at byrja við eini neyvari skilgreinan av, hvat harðskapur og harðskapsfaklig vitan er. Hetta leiddi til eitt breiðari samskifti um, hvønn leiklut harðskapur hevur í virkisøkinum hjá ymiskum stovnum og myndugleikum. Mótvegis endanum av samrøðunum mettu flestu aktørarnir tó, at harðskapur hevur ein leiklut á virkisøki teirra.

Í fylgiskjali 1 er eitt yvirlit yvir teimum stovnum og myndugleikum, sum verða mettir at hava eitt týdningarmikið markamót til harðskapsøkið. Fleiri av hesum aktørunum hava verið partur av kanningini. Talvan niðanfyri gevur eitt yvirlit yvir, hvørjir hesir aktørar eru. Endamálið við hesi talvu er at vísa á, at flestu aktørarnir, ið hava luttikið í kanningini, virka á einum harðskapsmarkamóti, og hava tískil eina aðra kjarnuuppgávu at loysa enn at lofta harðskapsraktum. Av hesum er tað *einans* Kvinnuhúsið, sum arbeiðir við harðskapsfakligheit burturav.

Sum talvan greitt vísir, so er harðskapsøkið sera fjølbroytt og tvørfakligt, har flestu aktørarnir hava *„so nógv annað sum kjarnuuppgávu á fakøkinum"*, sum eitt starvsfólk segði. Av tí at harðskapur í stóran mun ikki fyllur nógv á ymisku virkisøkjunum, so er tað heldur ikki nakað, sum flestu aktørarnir skráseta, hava greiðar mannagongdir um ella spyrja inn til.

Fleiri av aktørunum hava ofta samband við harðskapsrakt uttan at vita av tí – ella uttan at finna útav, at hesi eru harðskapsrakt. Orsøkirnar eru, at harðskapsrakt sjáldan seta orð á sínar upplivingar, og tí at fakfólk ofta ikki eru tilvitað um harðskap ella vanta fakligar førleikar at spyrja inn til harðskap – og heldur ikki vita hvagar tey skulu vísa til, ella hvussu tey skulu lofta teimum. Tørvur er á, at hesir aktørar fáa innlit í harðskapsøkið, soleiðis at harðskapsrakt skjótari kunnu verða lofta og skjótari kunnu verða víst til harðskapsfakligar ráðgevar.

Skráseting av hagtølum er umráðandi vitan í sjálvum sær, sum kann avdúka týðandi vitan um at eyðmerkja harðaskap, eins og mannagongdir at skráseta kunnu væntast at hava breiðari ávirkan á, hvussu og í hvønn mun harðskapur verður viðgjørdur av ymiskum aktørum.

### Talva 1: Aktørar við í kanningini

| Sivilsamfelag | Almennir myndugleikar & stovnar | Heilsuverk og tænastur |
|---|---|---|
| Kvinnuhúsið | Almannaverkið | Bráðmóttøkurnar á sjúkrahúsverkinum |
| Herbergið | Familjufyrisitingin | Tannlæknar |
| Heilbrigdið | Útlendingastovan | Kommunulæknar |
| Blákrossheimið | SSP | Ljósmøður |
| Frælsi | Barnaverdarstova Føroya | Neyðtøkutilbúgvingin |
| Gloria | Gigni | Psykiatriski depilin |
| Kris | Føroya Politi | |
| | Ákæruvaldið | |
| | Rættarhjálpin | |
| | Kriminalforsorgin | |

### 3. Skipan av tilfari eftir vísindaligum leisti

**Mælt verður til** at átøk verða sett í verk, sum tryggja, at hagtøl og tilfar um harðskap verða skrásett og skipað eftir einum vísindaligum leisti. Nágreiniliga verður mælt til, at ein verkætlan verður sett í verk, sum skal tryggja, at stóra mongdin av skrásettum tilfari hjá Kvinnuhúsinum kann nýtast í sambandi við vitanarmenning á økinum.

**Endamálið við hesum er** at tryggja, at verandi vitan kann brúkast í vísindaligum arbeiði frameftir, serliga tað tilfarið, sum Kvinnuhúsið longu hevur skrásett. Hetta fer at førka harðskapsfakliga økið í Føroyum á leið at kunna samanberast við vísindaliga arbeiðið, sum longu er grundað í grannalondum okkara, har fleiri vitanardeplar eru skipaðir sum ein sjálvstøðug eind undir kreppumiðstøðum.

**Samrøðurnar við aktørar vísa,** at tað er sera avmarkað, hvussu nógvir aktørar skráseta støður, har harðskapur framgongur á virkisøki teirra. Kvinnuhúsið er her eitt undantak og hevur nógv skrásett tilfar. Sama er galdandi fyri Føroya Politi, sum hevur greiðar mannagongdir fyri, hvussu mál við harðskapi verða skrásett. Hesar skrásetingar byggja á verandi lógarverk. Sum aktørarnir undirstrika, er nógv tilfar skrásett, sum – um tað verður greinað nærri – kann veita sera viðkomandi vitan um støðuna á føroyska harðskapsøkinum.

**Innlit frá kanningararbeiðinum**

Kvinnuhúsið umsitur nógv tilfar, eins og tey hava møguleika fyri at framleiða nógv meira tilfar. Arbeiðstrýst teirra er í øking, og tískil eru kreftir ikki til at leggja størri dent á at savna inn og skipa hetta tilfarið. Kvinnuhúsið hevur, sum nú er, tvær høvuðsfunktiónir; hesar eru at vera ein kreppumiðstøð og at veita ráðgeving. Av hesum fyllir ráðgevingarparturin nógv tann største partin av dagliga virksemi teirra. Skal størri dentur leggjast á at framleiða og savna inn vitan um dagliga virksemi á Kvinnuhúsinum, er neyðugt, at seta starvsfólk til hetta arbeiðið burturav.



# C. Upplivingar hjá harðskapsraktum

Triðja yvirskipaða tilmælið er at savna inn vitan um harðskapsupplivingarúr Føroyum. Harðskapsupplivingar eru sjálvsagt fjølbroyttar, og sum lýst varð í brotinum um harðskapsøkið, er harðskapsøkið myndað av ymiskum løgum, sum øll ávirka hvørt annað. Tað vil siga, at umframt at leggja dent á persónligu harðskapsupplivingina, er eisini neyðugt at taka hædd fyri breiðari samfelagsviðurskiftum.

Innsavnaða tilfarið bendir á, at nøkur serlig viðurskifti ávirka, hvussu harðskapsøkið sær út í Føroyum. Serliga smásamfelagskonteksturin ávirkar, hvussu harðskapsupplivingar í Føroyum á summum økjum víkja frá teimum í grannalondum okkara. Hetta er umráðandi at kanna nærri, soleiðis at átøk á økinum endurspegla sermerkta tørvin í føroyska samanhanginum.

### 4. Kanning av harðskapsupplivingum í Føroyum

**Mælt verður til,** at ein verkætlan verður sett í verk, sum skal kanna, hvussu persónar, ið eru ella hava verið úti fyri harðskapi, navigera harðskapsuppliving teirra í føroyska smásamfelagssamanhanginum.

**Endamálið við hesum er** at tryggja, at átøkini á harðskapsøkinum verða kjølfest í einum føroyskum samanhangi, eins og at støðið verður tikið í sjónarmiðinum hjá teimum, ið hava upplivað at navigera harðskapsuppliving teirra í Føroyum. Hetta vil eisini vera við til at eyðmerkja, hvørjar avbjóðingar og hvørji markamót fylla nógv á økinum.

**Í samrøðunum við harðskapsraktar kvinnur** standa sjálvar harðskapsupplivingarnar sera sentralt. Í hesum sambandi fyllur tað nógv at greiða frá harðskapseyðkennunum og harðskapsdynamikkunum, sum eru viðkomandi fyri persónligu upplivingina av harðskapi.

**Innlit frá kanningararbeiðinum**

Sum samrøðurnar við harðskapsrakt vísa á, eins og kunnugt er innan harðskapsfakliga vitan, er tað aloftast trupult hjá tí harðskapsrakta at viðurkenna, at man er fyri harðskapi. Hetta kemst av, at tað, sum serliga eyðkennir harðskap er ein stigvís normalisering og lítisgerðing av framda harðskapinum. Eyðkenda harðskapsmynstrið[14] vísir, at sum tíðin líður, økist valdið yvir tí harðskapsrakta, samstundis sum sjálvræðið minkar. Við tíðini gerst ein áhaldandi rannsakan ein partur av gerandisdegnum hjá tí harðskapsrakta. Ein kvinna greiðir soleiðis frá um, hvussu tað kendist hjá henni at liva í einari støðu, ið kravdi konstanta rannsakan av, hvørjar avleiðingar hennara gerðir og hugburður kundu hava:

> „Hansara sinnalag skifti so brádliga. Eg visti ongantíð, hvar eg hevði hann (...) Tað var sum at liva í einum minufelti. Eg visti ongantíð, nær eitt vreiðisútbrot kom, men eg visti, at tað var mín skyld. Hann fekk meg altíð at føla, at tað var okkurt við mær, sum gjørdi hann óðan. Eg rannsakaði meg sjálva allatíð."

14 Lundgren, E. (2001). *Våldets normaliseringsprocess: två parter-två strategier.* ROKS.

Av tí, at økt eftirlit og vald aloftast økjast stigvíst í harðskapi, sum verður framdur í nærsambondum, so er tað í hesum mynstri ofta ein eyðkend normaliseringstilgongd, sum kann gera tað sera torført hjá harðskapsraktum at sannkenna og skilja, at viðkomandi livir í harðskapi, og hvussu stóra ávirkan hetta hevur á lívið hjá viðkomandi. Ein kvinna greiðir soleiðis frá um hetta eftirlitið, sum fyri hana var ringt at skilja, og hvussu ringt tað í roynd og veru var:

> Eg tordi ikki at keypa ein keksapakka at hugna okkum við ella nakað annað, sum ikki var neyðugt. Eg byrjaði at blíva nervøs hvørja ferð, eg skuldi keypa inn. Onkuntíð lat eg børnini ganga longri tíð í vátum blæum – fyri at royna at strekkja blæupakkan longri, so eg ikki noyddist at keypa ein nýggjan, fyrr enn vit komu inn í næsta mánaðin. Hetta skammist eg sera nógv við og havi grátið nógv tár um, at eg mátti lata míni børn ganga soleiðis.

Dømi, sum hendan kvinnur lýsir, kann bólkast undir tað slagi av harðskapi, sum er fíggjarligur, umframt at harðskapurin, sum hon hevur livað undir hevði aðrar síður. Fíggjarligi harðskapurin gekk útyvir grundleggjandi tørvir hennara, eins og tørvir hjá børnum teirra. Kvinnan fortelur víðari, at fyrrverandi makin hjá henni plagdi at gera eitt neyvt yvirlit yvir, hvørjar pengar hon brúkti, samstundis sum hann sjálvur kundi brúka pening teirra, sum honum lysti.

Kvinnurnar lýsa ein eyðkendan harðskapsdynamikk, har tær so líðandi missa *„seg sjálva spakuliga burtur"*, sum ein kvinna orðar tað. Hetta, at harðskapurin og valdið økist, ger seg inn á sjálvsfatanina hjá tí harðskapsrakta og ávirkar tískil, hvussu tann harðskapsrakti interagerar við viðurskifti rundanum seg. Hetta er neyðugt at taka hædd fyri, tá hugt verður at, hvussu normar, virðir og mannagongdir í samfelagnum ávirka einstakar harðskapsupplivingar, og hvussu tann harðskapsrakti navigerar hesi. Sostatt mugu kanningar av ráðandi normum og virðum taka hædd fyri, at ymiskir harðskapsdynamikkir hava stóra ávirkan á, hvønn leiklut hesi spæla í navigering av harðskapsupplivingum.

## 5. Kanning av tøgnini, sum valdar á harðskapsøkinum

**Mælt verður til,** at verkætlanin, ið kannar hvussu harðskapsrakt navigera (átak 4), eisini leggur dent á at kanna ta tøgn, sum tykist vera valdandi á harðskapsøkinum. Hetta merkir, at dentur skal leggjast á at skilja betur, hvussu harðskapsrakt navigera í og við hesi tøgn, og hvat liggur aftanfyri hana.

**Endamálið við hesum er,** at tað skal gerast greiðari, hvørji serlig atlit mugu takast í sambandi við átøk á harðskapsøkinum, sum rætta seg eftir at bróta tøgnina á økinum. Millum annað kann hetta vera eitt týðandi íkast til arbeiðið hjá Sig-frá-átakinum, ið miðar seg eftir at *siga frá* og harvið bróta tøgnina.

**Sum heild vísa samrøðurnar,** at tøgnin sum eitt fyribrigdi vísir seg frá nógvum síðum og í stóran mun enn valdar á harðskapsøkinum. Tøgnin er heilt einfalt ikki bara nakað, sum skal brótast, og spurningurin er eisini, hvør verður álagdur ábyrgd av at bróta hana, og hvussu skal farast fram í tílíkum støðum.



### Innlit frá kanningararbeiðinum

Sum heild fyllir ein tøgn um harðskap nógv í samrøðunum, ið eru gjørdar við bæði harðskapsrakt og aktørar á harðskapsøkinum. Hendan tøgnin verður bæði greidd frá beinleiðis, eins og hon kemur til sjóndar millum aktørar við at (illgruni um) harðskap ofta ikki verður viðgjørdur. Sum lýst omanfyri tykist hetta millum annað at vera orsakað av, at ikki allir aktørar meta seg kunna gera nakað, tá ein illgruni um harðskap verður váttaður. Hetta sigur nakað um, hvat kann vera uppá spæl við at bróta tøgnina. Bæði fyri aktørarnar á harðskapsmarkamótinum, eins og fyri tann harðskapsrakta.

Fyri tann harðskapsrakta er tøgnin ambivalent; tí samstundis sum at tað at bróta tøgnina er partur av at koma úr sváru støðuni, so er tøgnin samstundis ein verja fyri tann harðskapsrakta. Ein partur av hesi verjuni knýtir seg at, at harðskapurin ofta økist, tá tann harðskapsrakti roynir at koma úr harðskapinum. Harumframt kunnu skomm, ótti fyri at onnur ikki fara at trúgva einum og stigmatisering eisini vera partur av, at tað er torført at bróta tøgnina. Harðskapsrakt gera ofta alt tað, tey kunnu, fyri at fjala útyvir harðskapin, tí tey ynskja at liva upp til normar og virðir, sum eru galdandi í samfelagnum. Ein kvinna greiðir soleiðis frá, um hvussu ambivalent tað kann kennast at gera vart við, at hon hevur verið fyri harðskapi:

> Tá eg byrjaði at tosa um, at eg hevði verið útsett fyri harðskapi, blivu flest øll sera illa við, tí tað høvdu tey ikki trúð. Onkur spurdi eisini, um hann virkuliga hevði bukað meg. Tá eg segði, at hann ikki hevði bukað meg likamliga, men at tað var sálarligur harðskapur, søgdu fleiri, 'Áh, tað var gott at hann ikki bukaði teg.' Tað var so hart, tí eg føldi, at tey gjørdu tann sálarliga harðskapin, og tað sum vit høvdu verið útsett fyri, til ikki at vera so álvarsamt og ikki hava týdning. Onkur segði eisini, at eg var so ljót at blaka hann út, tí hann var so fittur og stuttligur. Tey vistu ikki, hvat hevði gingið fyri seg innanfyri okkara fýra veggir, og hvørjar avleiðingarnar av sálarliga harðskapinum vóru. Eg havi tíverri eisini havt uppliving av, at onkur, sum hevur hoyrt mína søgu, hevur givið úttrykk fyri ikki at trúgva, at tað hevur verið so ringt. Tað er næstan tað ringasta, tí eg føli, at mín fyrrverandi maður og harðskapurin verður forsvaraður. Onkuntíð fái eg eisini eina kenslu av, at tey halda, at eg má hava havt skyldina sjálv av, at eg varð útsett fyri harðskapi. Tað kennist, sum um skommin verður koyrd yvir á meg, og ikki á hann. Ofta fái eg eisini eina kenslu av, at fólk blíva so friðarlig, tá eg nevni okkurt um harðskapin. Eg hugsi, at hetta helst kemur av, at hetta er eitt so stórt tabu at tosa um, og at fólk slett ikki vita, hvat tey skulu siga. Eg havi tíbetur eisini fingið sera góðan stuðul frá nógvum, sum hava skilt mína støðu, tá eg havi sagt frá um tað, sum eg havi verið útsett fyri.

Tað vísir seg, at harðskapsrakt viga fyrimunar og vansar við at bróta tøgnina ella at siga frá. Ofta kennist tað *lættari* at lata standa til enn at siga frá/søkja sær hjálp, tí tey ikki vita, hvat útfallið verður. Harðskapsrakt hava eisini ofta mist álitið á øðrum, tí tey til dømis eru so illa roynd av áðurgjørdum upplivingum. Sum til dømis at tey verða sædd sum trupulleikin ella at onnur siga *„nei hatta kann ikki passa"*. Hetta, tí tey bert hyggja eftir eini episodu av harðskapi og ikki eftir heildini/mynstrinum. Hetta vísir, hvussu nógv kann vera uppá spæl við at bróta tøgnina, sum í einum smásamfelag eisini inniber, at nógv fólk *kenna* fremjaran, og tískil eisini mugu fyrihalda seg til tað, tá tey reagera.

### 6. Kanning av harðskapsfatanum í Føroyum

**Mælt verður til,** at verkætlanin eisini fevnir um eina kanning av týdninginum, sum siðbundin familjuvirðir og kynsnormar hava fyri ráðandi fatanir av harðskapsraktum og harðskapsfremjarum.

**Endamálið við hesum er** at fáa eina betri fatan av harðskapsfatanum í føroyska samfelagnum frá einum kritiskum samfelagsvísindaligum sjónarhorni. Hetta er viðkomandi, tí valdandi ímyndir, virðir og fatanir hava avleiðingar fyri, hvussu harðskapsrakt skilja sína egnu støðu og fyri harðskapsfatanirnar, sum aktørarnir hava.

**Samrøðurnar vísa,** at tað er munur á, hvørjum harðskapsfatanum aktørar á økinum virka undir. Hetta hevur ávirkan á, hvussu tað kennist at navigera á harðskapsøkinum sum ein harðskapsraktur. Millum annað tí tað kann vera andsøgn í, hvussu ein verður møtt, tá ein leitar sær hjálp úr harðskapinum.

#### Innlit frá kanningararbeiðinum

> Eitt, sum eg hugsaði nógv um, var, at eg hevði lovað, at vit skuldu verða saman í viðgangi og mótgangi til deyðin okkum skilir. Tað píndi meg, men eg sá eisini, at hetta ikki handlaði um mótgongd. Um so var, var eg ikki farin frá honum. Eg hevði ongantíð ynskt hjúnaskilnað, um orsøkin ikki var so álvarsom. Men hetta handlaði ikki um mótgang; hetta handlaði um ágang. Tað hevði eg ikki lovað, og hann hevði afturat tí langtsíðan brotið sítt lyfti um, at hann skuldi elska og æra meg.

Hendan kvinnan greiður frá , hvussu avbjóðandi tað kendist *„at sleppa dreyminum um eina kjarnufamilju.“* Hetta er fyri hana ein partur av at viðurkenna harðskapin, sum hon upplivdi, og tískil var tað eisini trupult. Í samrøðuni tosaði kvinnan nógv um, hvussu nógv tað fylti, at hon ikki føldi, hon megnaði *„at vera ein góð kona“* fyri mannin hjá sær. Hesin hugsanarhátturin styrkti mannin tí hann áhaldandi segði henni, at hon *„var ein vánalig kona.“*

Kvinnan greiður frá um tá hon tosaði við ein sálarfrøðing um sínar kenslur um ikki at megna at liva upp til dreymin um at vera ein góð kona. Sálarfrøðingurin segði tá við hana, at tað var ikki henni tað var galið við í hesum hjúnabandinum; tað var ikki møguligt hjá henni at vera ein betur kona, tí tað hevði kravt, at hon *„hevði ein betri mann.“* Fyri kvinnuni var hetta eitt slag av vegamóti, og hon byrjaði at skilja, at tað var ikki henni, tað var galið við.

Í hesum førinum eyðmerkti sálarfrøðingurin harðskapin, sum kvinnan var fyri, og hjálpti henni við at seta orð á hann. Sálarfrøðingurin er dømi um ein aktør, sum sá og setti orð á harðskapin.

Samrøðurnar við aktørar, ið virka á harðskapsøkinum, vísa á, at harðskapsfatanir eru ymiskar – og broytast eisini sum frálíður. Eitt yrkisfólk sigur í hesum sambandi, at *„tann prototypan, sum man hevur í høvdinum av harðskapsfremjarum og harðskapsraktum, er kanska ikki rætt longur.“* Innan harðskapsfakið verður tosað kritiskt um ta ímyndina nógv í samfelagnum hava av harðskapsraktum og harðskapsfremjarum. Er myndin av harðskapsraktum og harðskapsfremjarum ikki rætt kann tað føra til, at harðskapur verður yvirsæddur tá persónurin ikki passar inn í hesa vanligu ímyndina.

Í hesum viðfangi verður m.a. tosað um sálarligan harðskap. Eisini verður tosað um foreldur, ommur og abbar, sum eru fyri harðskapi frá børnum teirra, harðskapsraktar menn, fólk við skerdum førleikum, sum eru fyri seksuellum ágangi og samanhangin millum harðskap og misbrúk, umframt harðskap og sálarstøðu. Øll hesi knýta seg at ymiskum sløgum av tabu, sum kunnu gera tað trupult at gera vart við harðskapin – um hann ikki verður viðurkendur.



# D. Viðkvæmir samfelagsbólkar og harðskapsøkið

Fjórða og síðsta yvirskipaða tilmælið er at eyðmerkja teir samfelagsbólkar, ið eru serliga útsettir fyri harðskapi og hava serligar avbjóðingar, tá tað kemur til at leita sær ráðgeving og hjálp í føroyska kontekstinum.

Altjóða gransking vísir á, at flestu minnilutar eru serliga útsettir fyri at vera úti fyri harðskapi og hava fleiri forðingar fyri at leita sær hjálp[15]. Tískil er tað serliga viðkomandi at kanna, hvussu støðan sær út í Føroyum hesum viðvíkjandi.

### 7. Kanning av støðuni hjá minnilutum á harðskapsøkinum

**Mælt verður til** at fara undir eina verkætlan, sum skal kanna, hvørjir samfelagsbólkar í Føroyum hava serligar avbjóðingar á harðskapsøkinum - hetta við denti á støðuna hjá minnilutum í Føroyum (t.d. tilflytarum, LGBT+ persónum, persónum við skerdum førleikum).

**Endamálið við hesum er** at eyðmerkja og skilja tær serligu avbjóðingar, sum minnilutar í føroyska samfelagnum hava, tá tað kemur til at leita sær trygga atgongd til harðskapsfakliga ráðgeving og kreppuhjálp. Hetta er neyðugt fyri, at harðskapsøkið verður betri ført fyri at lofta hesum persónum – hetta óansæð kyn, trúgv, húðarlit, tjóðskap, seksuella sannføring, málførleikar og so framvegis.

**Samrøðurnar við aktørar vísa,** at har eru samfelagsbólkar og sløg av harðskapi, sum hava lyndi til at detta niður í millum í samfelagnum. Vavið av hesari kanningini hevur havt við sær, at røddin hjá minnilutabólkum vantar í frágreiðingini. Neyðugt er við einari undankanning, sum kannar støðuna hjá teimum, ið detta niður ímillum. Í fylgiskjali 1 verður víst á nakrar aktørar, ið eru viðkomandi at tosa við afturat, millum annað LGBT+, MEGD og Sinnisbati.

#### Innlit frá kanningararbeiðinum

Tað er ymiskt, hvørjar stúranir harðskapsrakt hava tá umræður at bróta tøgnina og siga frá. Samrøðurnar við Útlendingastovuni vísa, at tað ofta er uppihaldsloyvi, sum tilflytarar eru stúrin um. Á Útlendingastovuni eru fleiri dømi um, at kvinnur ringja inn dulnevndar og varliga spyrja *„hvat nú, um eg fari frá manninum hjá mær?“*

Haraftrat vísir føroysk gransking, at tað ofta er trupult hjá tilflytarum at fáa eitt føroyskt netverk[16]. Hetta kann hava við sær, at útlendskar kvinnur ikki kenna til fortíðina hjá manni sínum. Onkuntíð hava starvsfólk á Útlendingastovuni vitað, at ein maður hevur verið harðligur móti fyrrverandi konu síni, men fáa einki gjørt, tá hann hevur fingið eina nýggja konu. Sum tey hava víst á, ber ikki til at siga: *„Veitst tú av, at maðurin hjá tær hevur bukað sína fyrrverandi konu?“*, eins og tey ikki kunna nokta manninum at fáa familjusamanføring við nýggju konuni.

Eitt annað, sum Útlendingastovan eisini hevur víst á er, at tað er sera torført at meta og ráðgeva um, hvat er best fyri tilflytarar at gera, tá hesi eru fyri harðskapi. Serlig atlit mugu nevniliga takast til støðuna hjá teimum. Millum annað kann hugsast, at tilflytarar kenna seg noyddar at viga kostnaðin av at „siga frá“ við onnur viðurskifti, so sum uppihaldsloyvi, trygd og møguligan mismun, sum tilflytarar kunnu verða fyri.

15 Martin, H. M, J. F. Thomsen og J. B. Poulsen (2022). *Partnervold i LGBT+-forhold: oplevelser af partnervold og erfaringer med støttetilbud. VIVE.*, European Union Agency for Fundemental Rights. (2014). *Being Trans in the European Union. Comparative analysis of the EU LGBT survey data.* Publications Office of the European Union. Luxembourg.

16 Hayfield, E. A., & Schug, M. (2018). 'It's like they have a cognitive map of relations': Feeling strange in a small island community. *Journal of intercultural studies*, *40*(4), 383-398.

**Fylgiskjal 1:**

# Aktørar á harðskapsøkinum

### Rættarskipanin

Løgreglan
Ákæruvaldið
Dómsvaldið
Kriminalforsorgin

### Felagsskapir og sjálvsognarstovnar

Kvinnuhúsið
Barnabati
Heilbrigdi
Blákrossheimið
Familjudeildin á Føroya Barnaheimi
Sjálvhjálpin
Rættarhjálpin
Amnesty International Føroyar
Reyði Krossur Føroyar
LGBT+ Føroyar
MEGD
KRIS
Sunnudagsskúlar
Ítróttarfelagsskapir
Frítíðarfelagsskapir
FUR
Margarinfabrikkin
Herbergið
Frælsi
Gloria
Samkomur
Prestar og kirkjur
Náttarravnarnir

### Aktørar í heilsuverkinum

Sjúkrahúsini
Skaðastovur
Psykiatriski depilin
Neyðtøkutilbúgvingin
Gigni
Heilsusjúkrarøktarfrøðingar
Jarðarmøður
Kommunulæknar
Sálarfrøðingar
Tannlæknar

### Aðrir aktørar

Almannaverkið
Útlendingastovan
Fólkaskúlar
Miðnámsskúlar
Útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum (t.d. sjúkrarøktarfrøði, námsfrøði, læraraútbúgvingin)
Heilsuskúli Føroya
SSP
Barnaverndartænastur
Familjudeildin á barnaheiminum
Námsfrøðingar
Familjufyrisitingin
Barnahúsið
Hýruvognatænastur

